# Sosialurin nú eisini í bussinum




*Birgir Høgnesen, leysasølurøktari á Marknaðardeildini hjá Sosialinum saman við einum hugagóðum bussførara á LEIÐ 400, har Sosialurin nú er at fáa fimm dagar um vikuna.*

**Sum nakað spildurnýtt og sum ein nýggj tænasta verður Sosialurin nú eisini at fáa til keyps í teimum báðum bussunum, sum røkja LEIÐ 400 millum Havnina og Klaksvíkina.**

BLAÐ OG BUSSAR
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Júst 10 ár eftir, at Sosialurin sum fyrsta blað í Føroyum fór út á alnótina, internetið við sínum blað, verður hetta blað nú eisini at fáa í bussunum, sum røkja LEIÐ 400. Birgir Høgnesen, sølumaður á marknaðardeildini hjá Sosialinum sigur, at hetta nýggja tiltak er avrátt við eigaran av teimum báðum bussunum, sum røkja LEIÐ 400, Andreas Poulsen.

–Eg haldi, at hetta er eitt genialt hugskot, tí so hava tey ferðandi altíð eina feska ávís, tá tey fara heimaftur eftir vanligan arbeiðsdag ella hava havt ørindi í høvuðsstaðnum ella tey norðanífrá ætla sær til Havnar sigur Andreas Poulsen.

Birgir Høgnesen, sum í løtuni fæst við at fáa allar leysasølurnar hjá Sosialinum at koyra sum tær eiga og soleiðis at tær eru mest kundavinarligar, sigur, at arbeitt hevur verið við hesi ætlan í eina tíð. –Eg haldi sjálvur, at tað var eitt stórt stig Sosialurin tók, tá hann í 1997 sum fyrsta blað í Føroyum fór út á internetið við blaðnum. Hóast hetta tiltakið við at hava bløðini í bussunum ikki er eitt eins stórt stig, so er hugaligt hjá okkum marknaðarfólkum at síggja, at her hendir nakað nýtt við jøvnum millumbilum. Mál okkara er, at landsins størsta blað skal vera so sjónligt sum gjørligt og fáast kring altíð landið, antin tú er á ferð ella á staðnum. Birgir Høgnesen lovar mongu kundunum hjá blaðnum, at hetta verður so ikki tað seinasta tiltakið heldur, har Sosialurin fer undir at menna kundatænastu sína kring alt landið.

# »Hvassafell« mundi siglt á land

**Klaksvík:** Hann var vestan í ættini í Klaksvík í morgun, tá»Hvassafell«, farmaskipið hjá Samskipum, mundi siglt á land á eystursíðuni.
Hetta var kl 8:45 í morgun, tá skipið skuldi venda inni á vágni og skuldi leggja at á vestursíðuni. Tá var tað bert fáar metrar frá at fara á land á eystursíðuni – og mátti bakka útaftur í seinastu løtu.




*»Hvassafell« hjá Samskipum var bert fáar metrar frá at fara á land í Klaksvík í morgu, tá skipið skuldi venda á vágni*
*Mynd: Poul A Mikladal*

Starvslýsing

Heimatænastan

## Røktarstarvsfólk til Heimatænastuna í Suðurstreymoy

Søkt verður eftir starvsfólkum til Heimatænastuna í Suðurstreymoy at byrja skjótast gjørligt ella eftir nærri avtalu.

- Talan er um tvey starvsfólk við fakligum kunnleika til gerontopsykiatri til gerontopsykiatriskan bústovn at arbeiða í skiftandi vaktum. Talan er um eina royndarverkætlan, fyribils til 1. apríl 2007.
- Ein heilsurøktara fyri starvsfólk í farloyvi 32 t/vikuna at arbeiða úti hjá brúkarum til 14. februar 2008.
- Ein heilsuhjálpara fyri starvsfólk í farloyvi 35 t/vikuna at arbeiða úti hjá brúkarum til 14. februar 2008.

Tænastan verður veitt í tøttum samstarvi við allar røktarfakbólkar, ið arbeiða í Heimatænastuni.
Umsøkjarar við viðkomandi útbúgving og starvsroyndum hava fyrimun.

Meiri fæst at vita um størvini við at venda sær til Metu av Fløtum, økisleiðara, á tlf. 31 72 49.

**Setanartreytir:**
Lønar- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og viðkomandi fakfelag. Setanarøkið er Nærverkið, og tænastustaðurin er fyribils Heimatænastan í Suðurstreymoy.

**Umsókn:**
Umsóknir við avriti av prógvum v.m. skulu sendast til:
Nærverkið
Heimatænastan
Skálatrøð 14
FO-100 Tórshavn
Stílað: Meta av Fløtum, økisleiðari

**Umsóknarfreist:**
16. februar 2007

*Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.*

NÆRVERKIÐ

sansir.fo

Meginskrivstovan, Postsmoga 3037, 110 Tórshavn, Tel 30 40 20, Faks 30 40 10, meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo